# VS-stevna í Vági

**Um vikuskiftið varð kappast í sonevndu VS-stevnuni í Vági**

SVIMJING
*Jákup Mørk*

Yngru svimjararnir í landinum eru longu farin undir sínar fyrstu kappingar, og um vikuskiftið varð sonevnda VS-stevnan hildin í Vági. Kappingin var fyri aldursflokkarna I til III. T.v.s. fyri tey 6-12 ára gomlu.

Sum heild gekk kappingin væl, men luttøkan var heldur minni enn vant, tí trý av svimjifeløgunum í landinum ikki tóku lut í kappingini. Sostatt gjørdist kappingin mest sum ein dystur millum Suðuroynna og Eysturoynna, har Vágs- og Tvøroyrar Svimjifelag umboðaðu suðuroyingarnar, meðan Fuglafjarðar Svimjifelag og Skeggjar úr Gøtu umboðaðu eysturoyingar.

Samlaða býtið av heiðursmerkjum framgongur av yvirlitinum niðanfyri, eins og úrslitið í einstøku kappingunum framgongur á síðuni.

| Felag | gull | silvur | bronsu |
|---|---|---|---|
| VS | 13 gull | 15 silvur | 9 bronsu |
| FS | 10 gull | 4 silvur | 5 bronsu |
| TS | 6 gull | 5 silvur | 9 bronsu |
| Skeggjar | 4 gull | 7 silvur | 4 bronsu |



## Úrslit, VS-stevnan 2002-09-17

**Kapping 1: 100 m. frí gentur B3**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Hildibjørg Joensen | TS | 1.16.6 |
| 2 | Elspa Mørkøre | Skeggjar | 1.18.9 |
| 3 | Heidi Strømsten | Skeggjar | 1.19.8 |

**Kapping 2: 100 m. frí dreingir B3**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Pauli Ø. Mohr | FS | 1.12.7 |
| 2 | Svein Magnason | FS | 1.24.2 |
| 3 | Pál Joensen | VS | 1.25.7 |

**Kapping 3: 100 m. frí gentur B2**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Rakul Hauritz | VS | 1.31.1 |
| 2 | Aster Thorsen | VS | 1.38.4 |
| 3 | Hildur Magnadóttir | FS | 1.56.4 |

**Kapping 4: 100 m. frí dreingir B2**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Tórur í Trøðini | VS | 1.46.1 |
| 2 | Hallur Petursson | VS | 1.48.7 |
| 3 | Benjamin Sikivat | TS | 1.50.7 |

**Kapping 7: 50 m. rygg gentur B2**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Aster Thorsen | VS | 0.54.2 |
| 2 | Rakul Hauritz | VS | 0.54.5 |
| 3 | Elisabeth Bærendsen | TS | 1.01.6 |

**Kapping 8: 50 m. rygg dreingir B2**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Tórur í Trøðini | VS | 0.55.9 |
| 2 | Jón Hofgaard | VS | 0.57.1 |
| 3 | Hallur Petursson | VS | 0.59.1 |

**Kapping 9: 50 m. rygg gentur B3**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Hildibjørg Joensen | TS | 0.40.9 |
| | Elspa Mørkøre | Skeggjar | 0.40.9 |
| 3 | Maria Vang | TS | 0.44.9 |

**Kapping 10: 50 m. rygg dreingir B3**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Pauli Ø. Mohr | FS | 0.41.7 |
| 2 | Búgvi Petersen | VS | 0.44.4 |
| 3 | Svein Magnason | FS | 0.44.6 |

**Kapping 11: 50 m. bringa gentur B2**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Rakul Hauritz | VS | 0.56.4 |
| 2 | Aster Thorsen | VS | 1.00.7 |
| 3 | Elisabeth Bærendsen | TS | 1.10.4 |

**Kapping 12: 50 m. bringa dreingir B2**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Jón Hofgaard | VS | 0.56.0 |
| 2 | Tórur í Trøðini | VS | 1.14.0 |

**Kapping 13: 25 m. rygg gentur B1**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Sólrun Henrysdóttir | VS | 0.37.8 |

**Kapping 15: 100 m. rygg gentur B3**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Hildibjørg Joensen | TS | 1.27.7 |
| 2 | Elspa Mørkøre | Skeggjar | 1.29.6 |
| 3 | Anna K. Eysturberg | TS | 1.36.8 |

**Kapping 16: 100 m. rygg dreingir B3**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Pauli Ø Mohr | FS | 1.27.5 |
| 2 | Svein Magnason | FS | 1.33.1 |
| 3 | Búgvi Petersen | VS | 1.33.2 |

**Kapping 17: 100 m. rygg gentur B2**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Rakul Hauritz | VS | 1.55.0 |
| 2 | Elisabeth Bærendsen | TS | 2.14.2 |
| 3 | Rósa Henriksen | VS | 2.24.2 |

**Kapping 18: 100 m. rygg dreingir B2**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Tórur í Trøðini | VS | 2.03.9 |
| 2 | Benjamin Sikivat | TS | 2.14.2 |

**Kapping 21: 50 m. firvald gentur B3**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Elspa Mørkøre | Skeggjar | 0.41.7 |
| 2 | Hildibjørg Joensen | TS | 0.44.0 |
| 3 | Barbara á Líðarenda | Skeggjar | 0.44.7 |

**Kapping 22: 50 m. firvald dreingir B3**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Pauli Ø. Mohr | FS | 0.51.3 |

**Kapping 23: 25 m. firvald gentur B2**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Rakul Hauritz | VS | 0.23.0 |
| 2 | Aster Thorsen | VS | 0.24.2 |

**Kapping 27: 50 m. bringa gentur B3**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Maria Vang | TS | 0.44.8 |
| 2 | Eyðbjørg Petersen | Skeggjar | 0.46.1 |
| 3 | Sanna Laksá | Skeggjar | 0.49.3 |

**Kapping 28: 50 m. bringa dreingir B3**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Pauli Ø. Mohr | FS | 0.46.4 |
| 2 | Pál Joensen | VS | 0.49.6 |
| 3 | Svein Magnason | FS | 0.53.4 |

**Kapping 33: 100 m. blandað gentur B3**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Hildibjørg Joensen | TS | 1.29.4 |
| 2 | Elspa Mørkøre | Skeggjar | 1.30.1 |
| 3 | Maria Vang | TS | 1.33.4 |

**Kapping 34: 100 m. blandað dreingir B3**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Pauli Ø. Mohr | FS | 1.30.2 |
| 2 | Svein Magnason | FS | 1.39.8 |
| 3 | Pál Joensen | VS | 1.44.0 |

**Kapping 35: 100 m. blandað gentur B2**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Rakul Hauritz | VS | 1.44.6 |
| 2 | Aster Thorsen | VS | 1.52.1 |
| 3 | Elisabeth Bærendsen | TS | 2.09.1 |

**Kapping 36: 100 m. blandað dreingir B2**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Jón Hofgaard | VS | 1.59.2 |

**Kapping 39: 25 m. firvald gentur B3**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Elspa Mørkøre | Skeggjar | 0.17.6 |
| 2 | Barbara á Líðarenda | Skeggjar | 0.17.9 |
| 3 | Hildibjørg Joensen | TS | 0.18.7 |

**Kapping 40: 25 m. firvald dreingir B3**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Pauli Ø. Mohr | FS | 0.19.5 |
| 2 | Búgvi Petersen | VS | 0.21.6 |
| 3 | Svein Magnason | FS | 0.22.6 |

**Kapping 41: 25 m. frí gentur B2**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Sóleyg Strømsten | Skeggjar | 0.17.7 |
| 2 | Rakul Hauritz | VS | 0.18.3 |
| 3 | Aster Thorsen | VS | 0.20.0 |

**Kapping 42: 25 m. frí dreingir B2**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Tórur í Trøðini | VS | 0.19.4 |
| 2 | Benjamin Sikivat | TS | 0.19.7 |
| 3 | Jón Hofgaard | VS | 0.19.8 |

**Kapping 43: 25 m. frí gentur B1**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Poula Ø. Mohr | FS | 0.29.6 |
| 2 | Jónfríð Hansen | FS | 0.29.7 |
| 3 | Sólrun Henrysdóttir | VS | 0.35.6 |

**Kapping 45: 25 m. frí gentur B3**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Hildibjørg Joensen | TS | 0.15.7 |
| 2 | Heidi Strømsten | Skeggjar | 0.16.0 |
| 3 | Maria Vang | TS | 0.16.1 |

**Kapping 46: 25 m. frí dreingir B3**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Pauli Ø. Mohr | FS | 0.15.6 |
| 2 | Búgvi Petersen | VS | 0.16.4 |
| 3 | Svein Magnason | FS | 0.16.9 |

**Kapping 49: 4x100 m. frí gentur B3**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | TS | TS | 5.25.7 |
| 2 | Skeggjar 1 | Skeggjar | 5.40.6 |
| 3 | Skeggjar 2 | Skeggjar | 6.49.0 |

**Kapping 50: 4x100 m. frí dreingir B3**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | FS | FS | 6.14.2 |
| 2 | VS | VS | 6.15.2 |



Broytingar

**Skálafjarðarleiðin**

**Frá mánadegnum tann 23. sep. siglir Ternan I eftir niðanfyristandandi ferðaætlan.**

**Siglir einans gerandisdagar**

| av Strondum | av Toftum | á Tórshavn |
|---|---|---|
| kl. 06:50 | kl. 07:00 | kl. 07:40 |
| kl. 13:40 | kl. 13:50 | kl. 14:30 |
| kl. 15:20 | kl. 15:30 | kl. 16:10 |

| av Tórshavn | av Toftum | á Strondum |
|---|---|---|
| kl. 08:10 | kl. 08:50 | kl. 09:00 |
| kl. 14:30 | kl. 15:10 | kl. 15:20 |
| kl. 16:20 | kl. 17:00 | kl. 17:10 |

Upplýsingar um ferðaætlanina fáast á rutuupplýsingini tlf. 34 30 30
Víst verður eisini til heimasíðu okkara á www.ssl.fo

STRANDFARASKIP LANDSINS

GRINDAMANNAFELAGIÐ

Heimsráð Hvalaveiðimanna

heldur aðalfund í Føroyum

**Øll áhuga eru vælkomin á fund um hvalaveiðu, sum verður í Norðurlandahúsinum 26.- 27. september 2002.**

Tilmeldingarfreistin er **fríggjadagin 20. september** kl. 15 hjá:

Kate Sanderson
Løgmansskrivstovan
Tlf: 35 10 10
e-postur: kas@tinganes.fo

**Kostnaður:** 150 krónur fyri hvønn dagin
- fyrilestrar, tilfar, kaffisteðgir og matur í Norðurlandahúsinum íroknað -

Sí meira um fundin og fundarskránna á **www.fisk.fo**

FISKISKIRANNSÓKNAR-STOVAN

**Prøvatakari m/k í Klaksvík**

Fiskirannsóknarstovan sóknast eftir einum fólki at taka prøvar av fiskalandingum í Klaksvík.

Arbeiðið krevur nærlagni og áhuga og eina hampuliga góða heilsu, men annars ikki nakrar serligar fortreytir.

Arbeiðið umfatar longdarmáting og viging av fiski, ið verður landaður til uppboðssølu og/ella fiskavirkini, umframt at nytrar skulu takast og hartil hoyrandi skriviarbeiði. Hetta arbeiði er ein liður í stovnsmetingararbeiðinum hjá Fiskirannsóknarstovuni.

Arbeiðstíðin lagar seg eftir, nær skip og bátar landa og er sostatt ikki fulltíðarstarv. Umsøkjarin má vera til reiðar at arbeiða ymsar tíðir á degnum. Latin verður vanlig tímaløn + kr. 300,00 fyri hvønn dag, prøvar verða tiknir.

Umsóknarfreistin er úti 24. september 2002.

**Fiskirannsóknarstovan**
Nóatún 1
Postsmoga 3051
110 Tórshavn

veitst tú ikki tað?

LANDSVERKFRØÐINGURIN

**Handverkari**

Søkt verður eftir dugnaligum og álítandi handverkara (m/k) til maskinmiðstøðina í Kollafirði.

**Arbeiðsuppgávur**
Arbeiði fevnir um viðlíkahald og umvælingar av maskinum hjá stovninum.

**Førleikakrøv**
Umsøkjarar skulu hava handverkaraútbúgving sum maskinsmiður ella bilmekanikari.

**Lønarviðurskifti**
Lønin verður sambært sáttmálanum millum og Føroya Handverksmeistarafelag og avvarðandi yrkisfelag.

**Umsóknir**
Umsøkjarar skulu ringja til Maskinmiðstøðina í Kollafirði tlf. 422420 ella 219180 og tosað við Dánjal Andreasen, leiðara av maskindeildini.

**Landssjúkrahúsið**
Starvsfólkadeildin

**Ljósmóðir**

Á Ljósmøðraskipanini á Landssjúkrahúsinum er eitt avloysarastarv sum jarðamóðir leyst til setan skjótast gjørligt og varandi til og við 28. februar 2003. (møguliga longri).

Løn- og setanarviðurskifti smb. sáttmálan millum Fíggjarmálaráðið og Ljósmøðrafelag Føroya.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Jytte Joensen, virkandi leiðandi ljósmóðir, telefon 313540, lokal 169.

Skrivlig umsókn við autorisatión og CV verður at senda til:

**Landssjúkrahúsið**
Starvsfólkadeildin
100 Tórshavn

Umsóknarfreistin er mikudagin 23. oktober 2002

**Jørð í Norðagøtu**

3 gyllin 10 skinn Yviri í Dal og 3439 $m^2$ bøur til sølu um nóg høgt boð fæst.

**Tlf. 441404/216304**

**Bakaralærlingur**

Okkum tørvar ein raskan bakaralærling. Hevur hettar tín áhuga so ring ella skriva til:

**Pf. Frants Restorff**
Tórsgøta 13 · Postsmoga 41
110 Tórshavn · Tlf. 311060

frants restorff

**Frá MBM-Kjøt**

Heystið er komið og slaktið er byrjað, so nú ber aftur til at keypa feskt føroyskt lambskjøt og annað av slaktinum.

Eisini hava vit føroyskar neytasíður til ein sámuligan prís.

**MBM-KJØT**
**FO-420 Hósvík**
**Tlf. 422482**